




Puntur nr.16

# Hetland, heimligt men spennandi

**Fríggjadagin fáa allir føroyingar møguleikan at flúgva til Hetlands, og uppliva oyggjarnar har, sum ikki eru ólíkar Føroyum, men samstundis eru serligar á sín egna hátt**

FERÐAMÁL



Hetland er okkara nærmasta grannatjóð, og fríggjadagin fer at bera tll okkum øllum at flúgva til oyggjarnar, og uppliva Hetland, sum vit halda vit hava so nógv til felags við.

Men hóast at Hetland og Føroyar hava nógv felagseyðkenni, so eru líka nógv, sum brýtur frá og ger oyggjarnar heilt serstakar. Mentanin og søgan gongur meiri enn 7000 ár aftur í tíðina, og hóast talan er um ein oyggjabólk eins og Føroyar, so er náttúran serstøk og eigur at upplivast.

## Enskt og ikki norrønt

Hóast tey á Hetlandi tosa enskt, og ikki nørrønt sum fyrr í tíðini, so eigur ein ikki at undirmeta serligu hetlendsku dialektina, ið setur sín heilt sermerkta dám á málið. Men hóast upprunamálið ikki livir í dag, so er tað tó í ein ávísan mun varðveitt við bygda-, staðar- og gøtunøvnunum. Hetta eru nøvn, sum allir føroyingar kenna aftur og skilja týdningin av, og sum er við at gera Hetland til eitt heimligt stað at vera, men samstundis eisini til eitt áhugavert og spennandi land at kanna nærri og uppliva.

Ríka fuglalívið ger eisini oyggjarnar serliga áhugaverdar at vitja. Har súlan bert er at finna í Mykinesi hjá okkum, so kunnu hetlendingar breggja sær av, at á oyggjum teirra eru ikki færri enn 46.000 súlur og 200.000 lundar. So fyri tey, sum hava áhuga fyri fuglum og fuglalívið, er Hetland eitt paradís.

## 100 oyggjar, og bert 22.000 íbúgvar

Møguleikarnir at ferðast í Hetlandi og kring oyggjarnar eru sera góðir. Har eru fleiri nýmótans og hugnalig hotellir, gistingarhús, summarhús og møguleikin, sum nógv ferðandi dáma sera væl, men sum at kalla ikki er í Føroyum, nevniliga ból og biti (bed & breakfast) er eisini ein máti at búgva uppá á oyggjunum.

Bróðurparturin av gistingarmøguleikunum er at finna á meginøkinum, men fleiri av teimum smærru oyggjunum hava eisini góðar gistingarmøguleikar.

Og oyggjarnar eru nógvar í tali. Fleiri enn hundrað eru tær, men tað er bert á 15 oyggjum, at teir góðir 22.000 íbúgvarnir hava valt at búsett seg.

Á sama hátt sum í Føroyum, hava tey í Hetlandi eitt væl útbygt samferðslunet við góðum vegum, ferjum og brúgvum, sum gera tað lætt at ferðast úr Lerwick runt oyggjarnar.

Sambært hetlendingum, so er Hetland staðið, har Skotland og Skandinavia møtast, og har norðsjógvurin og atlantshavið hittast.

Nú summarið er í hondum, eru dagarnir, á sama hátt sum her heima, sera langir. Hetlendingar eru blíðir av lyndi og taka væl ímóti ferðafólki, so tað er bara at pakka taskuna og fara avstað.




